miðvikan

Nr. 24 • 04. feb. 2009

Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar



**Anton Petersen:**

# Portugisari á Svartasker

**Tað vóru nógv skip frá ymiskum tjóðum undir Grønland. Tað hendu eisini vanlukkur, sum tá ið eitt portugisiskt doriuskip sigldi á Svartasker. Annars var tað eitt stórt framstig, tá ið fiskurin kundi avreiðast feskur**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**4. partur**

Í 1959 havi eg ein nýggjan bát, sum eisini æt Bogi. Hann var bygdur í Hvalba eins og báturin hjá pápa mínum.

Mikkjal bátasmiðurin í Hvalba smíðaði skrokkarnar á bátunum. Hetta var júst tann tíðin, tá ið teir nógvu bátarnir blivu gjørdir. Vit fingu so teir á bedingina á Tvøroyri at gera bátarnar lidnar við motorhúsi við stýrhúsi oman á, tiljur, mastur og árar. Motorin setti Heini Nygård í.

Heini var eisini norðuri í Hvalba eftir bátinum hjá mær við báti sínum Kolli og sleipaði hann upp á Tvøroyri. Groth Larsen gjørdi elektrisku innleggingina, eins og hann leveraði og monteraði radiosendara, móttakara og fiskalupp .



*Minnisvarði á Ravns Stóroy um teir, sum fórust við Ternuni*



*Ternen hálvdist av yvirísing í 1957, og átta ungir menn lótu lív*

## Hans Hedtoft, Umanak og Ternan

Vit gingu hvønn dag inn á bedingina at mála bátarnar. Hetta var veturin 1958-59. Eg minnist, tá vit komu inn á Tvøroyri seinast í januar, at onkur fortaldi okkum, at Hans Hedtoft var forlistur á Kappanum.

Greitt varð frá hesi hending í seinasta Vikuskiftis Sosiali. Men her skal eg skoyta uppí søguna um eina hending, sum ikki var við í hesi grein.

Hetta er í samband við frásøgnina um ferðamannaskipið Umanak, sum á heysti 1959 mundi gingið burtur bæði á ferðini til Grønlands og aftur til Danmarkar. Tað var serliga hetta, sum fekk menn at ivast í tí forsvarliga at sigla til Grønlands mitt á vetri.

Við í hesum orðaskifti var eisini, at 26. januar 1957 gekk eitt marinuskip Ternen burtur við átta monnum. Tá ið eg seinni sama vár kom í Føroyingahavnina, fekst at at vita frá Egon, sum var dani, og sum hevði hildið vakt í Føroyinghavnini um veturin, at Ternen var á veg úr Godthaab til donsku flotastøðina Grønnedal í Suðurgrønlandi. Teir komu inn í Føroyingahavnina 24. januar at bíða eftir betri veðri, og at banka ís, sum hevði lagt seg á bátin. Kuldin var átjan stig.

Dagin eftir hildu teir ferðina fram. Á kvøldið fær flotastøðin í Grønnedal boð um, at teir eru komnir til Ravns Stóroy. Síðan hoyrdist einki frá teimum. Farið varð at leita, men teir vóru tarnaðir av ringum veðri. Tann 31. januar varð báturin funnin á botni í havnini í Ravns Stóroy. Fleiri av monnunum vóru framvegis í koyggjunum, og hetta merkti, at vanlukkan var hend sera knappliga. Kanningar vístu, at talan hevur verið um yvirísing saman við manøvrering. Teir deyðu vóru blaðungir danir, marinarar, í aldrinum 19-30 ár.

Ternen var seinni á sumrinum tikin upp aftur. Tá vísti tað seg, at hann var púra óskaddur. Eg minnist hann liggja í Føroyingahavnini sum eitt dapurt minni um, hvussu vandafult tað var at sigla í Grønlandi, serliga á vetri. Báturin varð seldur til KGH.

Í 1991 varð reistur ein minnisvarði á Ravns Stóroy beint við staðið, har báturin møtti síni lagnu.

## Mistu bát av dekkinum

Samvinnufelag Fiskimanna stóð fyri útróðrinum hetta summarið og hetta var eisini seinasta árið, at vit vóru til saltfisk. ´

Samvinnufelagið var eitt lutafelag, sum fyrst í 50-unum var stovnað av Føroya Fiskimannafelag, sum átti 90% av lutapeningium. Hinir eigararnir vóru Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Motorpassarafelag, sum áttu 5% hvørt.

Hetta felag rak útróður og sølu av fiskinum fram til fyrrapartin av 60-unum. Tað hevði eisini handil á Bryggjubakka inntil fyri nøkrum árum síðani.

Vit fóru til Grønlands við farmaskipinum Fursund, sum var um 3.000 tons til støddar. Jógvan Martin Joensen úr Oyndarfirði var skipari. Vit tóku salt frá Saltsøluni í Havn, og har tóku vit eisini nógvar bátar inn.

Dekkið var fult og eisini vóru bátar niðri í lastini. Teir stóðu oman á saltinum. Vit vóru komnir norður til Havnar við bátunum Boga og Magnus Heinason nakað frammanundan. Teir vóru tiknir upp á keiuna hjá Bacalao við saltkrananum. Teir vóru tiknir fyrst umborð, og komu teir tí at standa í lastini oman á saltinum.



*Her blívur Bogi sleipaður av Hvalba upp á Tvøroyri at vera gjørdur liðugur, tað bleiv gjørt á bedingini inni í Trongisvági*



*Karin K. setur bátar út í Ravnstóroy. Hann hevur lagt at her á veg norður í Føroyingahavnina*

Tað var altíð fólk frá landi, sum gjørdi skipið sjóklárt og sum tískil eisini surraði bátarnar.

So var farið avstað. Nakað av vindi var ímóti, men einki illveður. Komnir nakað vestur úr Føroyum, umleið sigling í eitt samdøgur, fekk skipið eitt nos, og hann setti naka harðliga. Helst hevur tað verið ov nógv ferð við tílíkum farmi. Ein skopunarbátur fór í heilum líki í havið.

Eg haldi, at tað hevur verið ov illa frágingið við surringini. Tað var kanska heldur ikki so lætt. Skjótt skuldi berast at, og hetta var eitt stórt arbeiði.

Tað var ein syrgilig sjón at síggja henda nýggja og vakra bát fara rekandi aftur við borðinum. Tað var eingin roynd gjørd at